# Sýna fram ungar føroyskar menn

**Tann 8. august skipa Faroearts og Café Jónas fyri listaframsýning, nevnd »Unge Færøsek Mænd« í Keypmannahavn. Fernisering verður sunnudagin 8. august kl 16 - 18. Café Jónas er ein nýupplatin norrøn mentanarcafé í hjartanum av Keypmannahavn, beint við Kongens Nytorv**

LISTAFRAMSÝNING

Café Jónas og Faroearts fara at sýna fram tríggjar lutfalsliga ungar føroyskir listamenn í august. Teir tríggir umboða á hvønn sín hátt sera spennandi brigdi av nýggjari føroyskari myndlist.

### Brandur Patursson

Brandur arbeiðir við ymiskum tilfari í fleiri dimensiónum, eins og hann setir saman fleiri stílsløg. Av og á sæst greiður íblástur úr eitt nú teknirøðum og frá kung fu, sum Brandur hevur íðkað í fleiri ár.

Í myndlistini hjá Brandi verður arbeitt traditiónsbundið við kompositión og litseting, men eisini meira frítt, har listamaðurin t.d. brúkar kropp og hár til at úttrykkja seg við. Tessvegna er ikki alt máling á lørift hjá Brandi - hann hevur eisini virkað við glasi og fotomyndum, ið vera kliptar saman til kollasjur, ofta við óvanligum og humoristiskum úrsliti.

### Tummas Jákup Thomsen

Tummas Jákup, ið ofta verður umrøddur sum hin føroyski surrealisturin, hevur í sambandi við hesa framsýning valt at arbeiða einamest við rúminum kring nakað, mann ikki ofta sær avmyndað - naglar.

Tummas Jákup nýtir á hesi framsýning oljumáling á lørift og við at seta blýantsstrikur oman á skapar hann eitt óvanligt rúm til naglarnar at flóta í. Tummas Jákup granskar á henda hátt tað óvanliga í tí vanliga á ein sera hugtakandi hátt.

### Bárður Oskarsson

Bárður mann vera mest kendur fyri at mála stórar, einfaldar og sera groteskar málningar. Á eini ofta einlittari grund síggja vit surrealistiskar skapningar, ið tíðum fáa teg at flenna, meðan teir aðra tíðir geva tær vaml. Tað er sum um, at hesir merkiligu skapningarnir, t.d. flúgvandi grísar og royttir høsnarungar við mannahøvdum, ella -limum noyða kenslur upp í áskoðaran. Bárður málar eisini karikeraði menniskju. Tey kunnu virka púra vanlig, men so er alt ov nógv gjørt burtur úr onkrum stakluti, so at mann verður fangaður og hugtikin.

### Café Jónas

Caféin er ein nýupplatin norrøn mentanarcafé í hjartanum av Keypmannahavn, beint við Kongens Nytorv. Café Jónas leggur seg eftir at sýna fram serliga íslendska og føroyska mentan. Sostatt er Jónas eitt stað, har tú kanst hugna tær við list og tónleiki, meðan tú nýtur ein góðan bita og okkurt gott at drekka afturvið.

Cafe Jonas er at finna á Landgreven 3, 1301 KBH K
tlf: 3332 1915,
www.cafejonas.com





*Ungfólk í Nólsoy, sum spældu við í filminum 'Selkvinnen' í 1953*

# Forkunnugur filmur vístur í Nólsoy á Ovastevnuni

**Filmurin »Selkvinnen« frá 1953, har »Nólsoyar Páll« er høvuðsleikari, verður vístur í Nólsoy í Royndarhúsinum øll stevnukvøldini. Hetta var fyrstu ferð, at tað eydnaðist professionellum at filma grindadráp**

BYGDARSTEVNA

Í 1953 var norskt filmsfelag í Føroyum og tók upp film, sum fekk navnið »Selkvinnen« - á føroyskum »Kópakonan«.

Filmurin byggir á lív Nólsoyar Páls og hansara stríð móti yvirvøldini í Føroyum. Filmurin samsvarar tó ikki heilt við søguna, sum vit kenna hana. Heitið á filminum kemur av, at søgnin um kópakonuna eisini er flættað inn í søgugongdina.

Nógvar náttúrumyndir ymsastaðni úr Føroyum eru við, eitt nú úr Nólsoy, Koltri, Mykinesi og Saksun. Flestu leikarar eru norðmenn, men føroyingar síggjast eisini. Eitt nú spældu ungfólk úr Nólsoy við sum kópafólk á helluni.

Í filminum sæst eisini grindadráp, og filmsleikarar eru við í øllum rokanum. Sagt verður, at hetta var fyrstu ferð tað eydnaðist professionellum filmsfólkum at fáa myndir av grindadrápi.

Ógvuliga fáir føroyingar vita um hendan filmin, og enn færri hava sæð hann, men nú stevna verður í Nólsoy, hevur bygdafelagið »Royndin« lánt filmin frá norska filmsinstituttinum í Oslo. Filmurin er ein góðan tíma langur. Hann verður vístur øll stevnukvøldini í Royndarhúsinum í Nólsoy - fríggjakvøldið kl 21.30 og leygarkvøldið og sunnukvøldið kl 21.00.

Royndarhúsið í Nólsoy skipar eisini fyri dansi leygarkvøldið 7. august kl. 24.00 við Fimmboga Lisberg og Jógvan Olsen.

# Gera býin til reiðar

**Klaksvíkin fyrireikar seg nú av sonnum til stóra Summar Festivalin, sum byrjar hósdagin í næstu viku**

FESTIVALUR
*Eirikur Lindenskov*

Í Vágsbø settu teir í gjár upp stóra pallin, sum verður karmur um stóra útitiltakið. Har verða nøkur av teimum stóru nøvnunum hoyra, so sum Ken Hensley, Boney M, Frændur o. fl.

Umframt hendan pallin verða eisini aðrir pallar í býnum, eitt nú verður Sparikassapallurin eisini settur upp í túninum í Norðoya Sparikassa.



*Mikumorgunin vóru teir í ferð við at seta upp stóra pallin í Vágsbø í Klaksvík, ið verður karmur um stóra úttiltakið á Summar Festivalinum, sum byrjar hósdagin í komandi viku*
*Mynd: Símun á Høvdanum*



# Tey eldru í eysturbýnum klaga býráðið



*Eldru íbúgvarnir í eysturbýnum í Havn eru ónøgd um, at bert ein einstøk felags endurnýtslubingja er sett upp fyri mongu húsini at nýta. - Vit hava gjørt vart við, at vit ikki orka at ganga so langt við okkara ruski, men hetta leggur býráðið líka í, siga tvær eldri kvinnur í Bókbindaragøtu*
*Modellmynd: Maria Olsen*

**Um tey eldru í eysturbýnum í Havn vilja sleppa av við ruski í bingjurnar til endurnýtslu, mugu tey ganga alt ov langt, tí Tórshavnar býráð bert hevur sett upp eina einstaka felagsbingju í einum stórum øki. - Vit hava gjørt vart við, at vit ikki orka at ganga so langt við okkara ruski, men hetta leggur býráðið líka í, siga tvær eldri kvinnur í Bókbindaragøtu**

RUSK
*Heini í Skorini, heini@sosialurin.fo*

Øki í eysturbýnum í Havn kring Bókbindaragøtu og Eysturstræti er burturav eitt øki fyri eldri fólk. Í mongu raðhúsunum búleikast næstan bara íbúgvar, sum eru komnir langt upp í árini, og sum heild er miðalaldurin sera høgur í hesum partinum av Havnini.

Men hetta tykist Tórshavnar býráð sambært fleiri í eysturbýnum ikki at geva sær far um. Í stórum pørtum av Havnini hevur hvørt húsarhald fingið eina grøna endurnýtslubingju í part at koyra pappírsrusk í, men í eysturbýnum hevur býráðið bert sett upp eina felagsbingju á einum spæliplássi, og henda bingjan fevnir um eitt stórt øki. Sambært teimum báðum kvinnunum í Bókbindaragøtu eru eins nógv hús í økinum sum øll Eiðis bygd.

Tí hava summi langa leið frá húsum til bingjuna, og tað orka gomlu fólkini í eysturbýnum ikki, hóast tey hava eitt ynski um at taka lut í nýggju skipanini við endurnýtslu av burturkasti.

### Frekt býráð

Tvær eldri kvinnur í Bókbindaragøtu harmast um støðuna og siga seg umboða fleiri onnur eldri í økinum, sum fegin vilja nýta og stuðla skipanina við endurnýtslu av pappíri, men sum vegna aldur og bilandi heilsu ikki orka at bera ruskið so langan veg.

- Vit hava ringt til Tórshavnar býráð at gera vart við støðuna, men har tykist lítil vilji vera at betra um viðurskiftini hjá okkum gomlu her úti. Vit hava sagt frá, at vit hava brúk fyri fleiri bingjum, men vit eru framvegis noydd at ganga alt ov langt at sleppa av við okkara rusk til endurnýtslubingjurnar, siga tær báðar.

Tær fingu fyrst at vita frá býráðnum, at tað var ov dýrt at geva øllum hvør sína bingju. Síðani vórðu tær av býráðnum spurdar, um tær ikki høvdu onkran at senda fyri seg við ruskinum.

- Hetta helt eg vera nakað frekt og nasvíst, tí eg havi nevniliga ongan at fara við ruski fyri meg, sigur eina kvinnan. Í fleiri øðrum økjum í Havn hevur hvørt húsarhaldið fingið bingju til endurnýtslu av pappírsruski, men ikki í økinum, har miðalaldurin kanska er hægstur í allari Havnini.

### Gomul og gloymd

- Hetta er diskriminering. Vit vilja fegin nýta nýggju skipanina við endurnýtslu, men tá býráðið setur eina einstaka bingju upp í einum øki, sum er líka stórt sum Eiðis bygd, megna vit ikki at ganga so langt, siga tær báðar.

Tær halda tað vera hugstoytandi, at tá býráðið setur eina góða skipan í verk, er hon bert fyri yngru og raskari menniskju. Eldru íbúgvarnir í eysturbýnum siga seg harmast um, at tey eldru ikki eisini fáa lut í eini skipan við endurnýtslu av pappírsruski, og tey føla seg á ein hátt uttanfyri.

- Vit høvdu ynskt, at myndugleikarnir eisini góvu okkum møguleikan at luttaka í teimum skipanum og ætlanum, sum samfelagið ger, so vit eisini kenna okkum at vera part av heildini, men í løtuni kenna vit okkum uttanfyri tey tøkini, myndugleikarnir og fólkið tekur, siga tær báðar kvinnurnar í Bókbindaragøtu, sum vilja vera ónevndar.

*Tað er ein tung leið hjá gomlu íbúgvunum í eysturbýnum í Havn at fara við ruski*
*Myndir: Maria Olsen*





# Atfinningarnar skulu kannast

**Formaðurin í umhvørvisnevndini í býráðnum, Torfinn Smith, er sinnaður at kanna atfinningarnar frá eldru fólkunum í eysturbýnum og gera broytingar, um neyðugt er**

RUSK
*Heini í Skorini, heini@sosialurin.fo*

Torfinn Smith varar av nýggju skipan býráðsins við endurnýtslubingjunum kring Havnina, og hann er sinnaður at kanna atfinningarnar hjá eldru íbúgvunum í eysturbýnum, sum siga, at teinurin til felagsbingjuna er alt ov langur.

- Vit taka allar atfinningar í álvara, og um tað er rætt, at tey eldru ikki hava høvið at taka lut í skipanini við endurnýtslu av pappírsruski, skulu broytingar gerast, sigur Torfinn Smith.

Formaðurin í náttúru- og umhvørvisnevndini í býráðnum sigur, at teir hava valt at seta felagsbingjur upp í teimum tætt bygdu økjunum, t.d. í Berjabrekku, Tórsbyrgi og raðhúsunum í Bókbindaragøtu, og tí stendur bert ein bingja har úti.

- Men um teinurin frá húsum til bingjuna er ov langur til, at tey gomlu eisini fáa lut í skipanini, skulu broytingar gerast, lovar Torfinn Smith.

Hann sigur, at fá fólk eru til arbeiðis á býráðnum í løtuni, men í næstu viku skal hyggjast nærri at málinum og kannast, um fleiri bingjur skulu setast upp í eysturbýnum, so tey eldru har úti ikki føla seg forsømd.